# Sólbjørn 25 ára starvsdag

Í sambandi við at Sólbjørn Thomsen, deildarleiðari, hevði 25 ára starvsdag hjá Vøruhúsinum á Hjalla tann 1. mars, verður móttøka á møbladeildini í dag, fríggjadagin 6.mars.

Sólbjørn er skopuningur sum hevur búð í Havn í mong ár. Hann byrjaði tann 1. mars 1984 hjá Litaval, sum tá helt til í Brekkutúni í Hoyvík, har sum Fornminnissavnið er í dag. Fyrsta arbeiðið hjá Sólbjørn var at seta møblar saman og at koyra vøru út til kundar. Seinni fekk hann arbeiði sum sølumaður í handlinum, og síðan fyrst í 90-unum hevur hann verið leiðari á gólvdeildini.

Starvsfelagarnir siga, at Sólbjørn er ein persónligheit, hann er erligur, sigur tingini sum tey eru, so teir vita altíð hava teir hava hann. Eisini hevur hann góðan humor. Sólbjørn er eisini kendur sum íðin HB-viðhaldsmaður.



†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Per Húsgarð**
bóndi, í Syðrugøtu

andaðist á Landssjúkrahúsinum, hósdagin 5. mars, 79 ára gamal.
Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum, leygardagin kl. 17.00
Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju sunnudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Elinborg, Líggjas, Marjun og Pætur**

# Gentur í millumskúlaflokki

Mynd frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er av fýra gentum í 4. millumskúlaflokki í 1946, sum lesa til prógvtøku.

**Fremst f.v.:** Gunna (Dyssa) Zachariassen, Anna Jacobsen (Mohr) og Ingibjørg Jacobsen (Djurhuus)

Aftan fyri tær er Anna Sofía Hentze (Nolsøe).

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 19).

*Myndaeigari: Ingibjørg Djurhuus*



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá ið góða kona, mamma, vermamma, omma og langomma

**Elly Atlanta Joensen**
Vágur

andaðist og varð jarðað.
Takk til starvsfólkini á Suðuroyar sjúkrahúsi.
Tøkk til øll í Frelsunarherinum og øll, sum hjálptu til í ervinum.
Takk fyri blómur og minningargávur til Frelsunarherin.

*Familjunnar vegna*
**Frederik Joensen, Vágur**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá góða elskaða mamma, vermóður, omma og langomma okkara

**Mimi Hansen**
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðað.
Vit takka fyri tey troystar orð frá Bernadinu og Meinhard Bjartalíð, presti.
Og tykkum, sum hjálptu við ervi og fylgdu mammu til síðsta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**
**Alexandra, Anna, Marjun og Petur Martin**

**80 ára føðingardagur**
7. mars verður Jákup Martin Wang Kvívík 80 ár. Dagurin verður hildin heima.

**75 ára føðingardagur**
Týsdagin 3. mars fylti Andreas Hansen - vanliga nevndur Dia, Kollafjørður 75 ár. Tey, ið vilja heilsa upp á Dia, eru vælkomin til ein bita í Missiónshúsinum í Kollafirði leygardagin 7. mars kl. 11-16.

**70 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 6. mars verður Piddi Hansen av Toftum 70 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**45 ára føðingardagur**
24. mars fyllir Kári H.Debess, Sumba, 45 ár. Dagurin verður hildin í samkomuhúsinum í Sumba 21. mars kl. 19. Tey, sum vilja gleða meg við at koma í føðingardag, vinarliga sigið frá á telefon 274006 ella 218139 áðrenn 15. mars.

**Brúdleyp**
25. apríl 2009 kl. 12 giftast í Betesda, Klaksvík: Elsebeth P. Eyðunsdóttir Jacobsen, Svínoy og Marni Steinberg, Klaksvík. Veitslan verður á hotel Norð kl. 16. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg á tlf. 226916 (Elsebeth) ella tlf. 220061/ 287307 (Marni) innan 31. mars 2009.

**Dagurin**
**6. mars. Gotfred**. Óvíst er, hvønn sipað verður til. Summir halda ein kardinal í Róm, deyður umleið ár 1100, aðrir ein biskup í Amiens, deyður í 1115. Týskt navn settsaman av orðunum Guð og friður.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*